# Bygdarráðsfundur

# Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 25.11.2019 kl. 17.30

Á fundi: Janus Thomsen
Eir J. Norðberg
Magni Bertholdsen
Niels Olaf Eyvindsson
Gunnhild Mortensen
Rúni Thomsen
Sten Spange Larsen

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **Innkomin tilboð uppá borð til Roynhøllina.**
   Innkomin tilboð uppá borð til støðutakan.
   **Trivnaðarnevndin 22.11.2019:**
   Nevndin ynskir at vita, hvørjum tilfari borðpláturnar eru gjørdar av, áðrenn støða verður tikin.
   **Fíggjarnevndin 25.11.2019:**
   Samtykt varð einmælt at mæla til, at tikið verður av tilboðnum frá Elding kr. 33.750,00 uttan MVG.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at taka av tilboðnum frá Elding.

2. **Musikkskúlin – innkomið skriv.**
   Musikkskúlin er farin í samstarv við skúlarnar í Suðuroynni um fýra ymisk kór, ið kunnu hava felags tiltøk. Skúlaleiðslurnar hava víst hesari verkætlan áhuga.
   **Trivnaðarnevndin 22.11.2019:**
   Nevndin mælir til at játta pening til kórundirvísing.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at játta hesum.

3. **Innkomið tilboð/meting uppá umvæling av bátabrúgv v.m.**
   Tvey tilboð eru innkomin.
   **Vega- og havnanevndin 15.11.2019:**
   Nevndin mælir til at taka av tilboðnum frá Tangavirkinum kr. 20.500,00 u/MVG.
   **Fíggjarnevndin 25.11.2019:**
   Nevndin hevur sama tilmæli sum Vega- og havnanevndin.

**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at taka av tilboðnum frá Tangavirkinum.

4. **<u>Onnur viðgerð av fíggjarætlan 2020</u>.**
Fíggjarætlanin fyri 2020 til viðgerðar.
Mettar inntøkur íalt: kr. 31.229.000,00
Rakstrarútreiðslur íalt: kr. 28.111.000,00, íroknað eldraøkið kr. 8.029.000,00
Løgur íalt: kr. 10.250.000,00
Inntøkurnar í sambandi við eldraøkið eru kr. 8.029.000,00 sambært meting frá FMR. Løgurnar eru kr. 10.250.000,-, her eru kr. 7.000.000,- settar av til bátahyl.
Skattaprosentið verður 19,75% og barnafrádrátturin verður óbroyttur kr. 6.500,-.
**Fíggjarnevndin 25.11.2019:**
Nevndin mælir til at góðkenna uppskotið um fíggjarlóg 2020.
**Avgerð:**
Samtykt við seks atkvøðum fyri at taka undir við fíggjarætlanini.

5. **<u>Fyrsta viðgerð av eykajáttan 2019</u>.**
Eykajáttanin fyri 2019 á kr. 1.718.000,- til viðgerðar.
**Fíggjarnevndin 25.11.2019:**
Nevndin hevur gjøgnumgingið eykajáttanina og hevur ongar viðmerkingar.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at taka undir við eykajáttanini.

6. **<u>Kunning</u>.**
Niels Olaf kunnaði um, at Tekniska nevnd hevur viðgjørt málið um móttøku av dekkum og avgjørt at broyta reglugerðina, soleiðis at tikið verður móti dekkum. Dekk og felgur skulu verða skild sundur.

7. **<u>Ikki almenn mál</u>.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 19.00

Janus Thomsen Eir J. Norðberg Magni Bertholdsen Niels Olaf Eyvindsson

Gunnhild Mortensen Rúni Thomsen Sten Spange Larsen